# Elding byggir stóra handilsmi›stø›

**Elding hevur lagt tær endaligu ætlanirnar um at byggja ein stóran handilsbygning í Saltangará. Pláss verdur fyri 15-20 handlum í handilsdeplinum, og stjórin í Elding, Mads Andreas Winther, væntar, at fari › ver›ur undir arbei › i › á › renn summarfrítí›ina**

HANDILSDEPIL
*Stefan í Skorini*



*Solei›is fer mi›gongdin í n‡ggja handilshúsinum hjá Elding at síggja út. Pláss ver›ur fyri 15-20 handlum, og arbei›i› skal byrja á›renn summarfrítí›ina*

Nú fær Eysturoyggin sína egnu sølumi›stø›, kalla› Eystlon. Húsi› ver›ur í trimum hæddum, 104 metrar til longdar og 34 metrar breitt. Runavíkar Bygdará› hevur gó›kent ætlanirnar fyri handilsdepilin, sum tekur eitt ár at byggja. Ætlanin er, at bí›ast skal ikki longri enn til summarfrítí›ina, á›renn fari› ver›ur undir byggiarbei›i›, men kanska ver›ur byrja› á›renn hetta.

Longu nú hevur Elding fingi› onkran leigara, sum skal hava pláss í handilshúsinum, og í næstum ver›ur søkt eftir fleiri leigarum, i› vilja hava sítt virksemi í bygninginum.

– Vit fara at leggja okkum eftir at fáa eitt fjølbroytt handilshús vi› nógvum ymiskum handlum, so møguleiki skal vera hjá vi›skiftafólki at fáa allar vanligar vørur, sigur Mads Andreas Winther.

### Liggur væl fyri

Handilshúsi› fer at liggja nor›anfyri Beta og Skipafelagi› ni›anfyri høvu›svegin javnt vi› havnavegin. Hetta er mi›skei›is í b‡num, og handilshúsi› liggur tí væl fyri.

Húsi› fer at hava tríggjar hæddir, og samla›a víddin verdur 10.000 fermetrar. Kjallarin er ætla›ur til goymslur hjá handlunum og skrivstovur. Eisini verdur møguleiki hjá ymsum fyritøkum at hava offshore og supply virksemi í bygninginum. Í kjallaranum ver›a gó› vi›urskifti hjá vørubilum at avskipa vøru til handlarnar.

Midhæddin ver›ur parkeringsøki, har pláss ver›ur fyri 130 bilum, og til ber at sleppa inn í parkeringsøki frá høvu›svegnum í sunnara endanum. Lyfta og trappur eru frá parkeringsøkinum til handlarnar ovast.

Ovasta hæddin er 3.500 fermetrar og er bara ætla› handlum. Umframt handlarnar ver›a tvey torg og ein mi›gongd. Ljós sleppur gjøgnum lofti›, og tí ver›ur hetta eitt ljóst og kundavinarligt umhvørvi. Tvær høvu›sinngongdir eru frá høvu›svegnum, harav tann eina er ætla› barnastólum og koyristólum.

Tad skerts ikki burtur, at ein so stórur bygningur fer at merkjast í bygdini, men Mads Andreas Winther sigur, at teir hava roynt at gera húsi› soleidis, at ta› ver›ur so líti› dominerandi sum gjørligt í umhvørvinum.

### Hetta er ikki aftur í 80-ini

Verulig gongd er nú komin á vinnulívi› í Føroyum, men Mads Andreas heldur avgjørt ikki, at vit eru vid at taka eitt stig aftur í 80 árini vi› ørvitisætlanum.

– Vit hava gjørt eitt stórt kanningararbei›i og tiki› nógv ymisk ting vi› í okkara metingar, sum skulu til, á›renn fari› ver›ur undir eina tílíka ætlan. Vit eru tí tilrei›ar at fara undir arbei›i›.

Arbeitt hevur veri› hart vi› ætlanunum teir seinastu seks mána›irnar, og nú er næstan alt komi› uppá pláss. Stjórin í Elding vil ikki uppl‡sa prísin á hesi verkætlan, tí enn er ov tí›liga at siga naka› nágreiniligt hesum vi›víkjandi.

– Eg vil heldur sleppa frá siga júst nær lati› ver›ur upp. Arbei›i› er mett at taka eitt ár, og vit mi›a ímóti at byrja einafer› á›renn summarfrítí›ina næsta ár.

– Vit meta Eysturoynna at vera sera áhugaverda, og Saltangará er mi›depilin hjá handilslívinum. Handilshúsi› fer óiva› at hjálpa øllum handilslívinum sum heild, tí í løtuni vanta bæ›i parkeringsøki og handilshøli í økinum.

Sum stø›an er nú, fara fleiri fólk úr Eysturoynni til Havnar at gera stórinnkeyp, men teir í Elding ætla sær at broyta hetta mynstri› vi› at lokka fólk heldur at keypa í handilsdeplinum. Í dag koyra eini 7000 bilar framvi› økinum, har handilshúsi› ver›ur bygt.

Mads Andreas metir, at handilshúsi› fer at geva handilslívinum á sta›num eitt skump frameftir og fer at draga enn fleiri fólk til øki›.

### Elding er í vøkstri

Smápartafelagi› Elding var› stovna› fyri fimm árum sí›ani, men felagi› hevur økt nógv um virksemi›, sí›an fyrsti handilin lat upp í 1995. Í Eysturoynni hava teir havt eina deild í tr‡ ár, og í Klaksvík hevur Elding veri› í eitt ár. Í dag eru 24 starvsfólk kn‡tt at Elding.

Nú ver›ur so enn meira kol lati› á ketlarnar, nú fyritøkan fer undir at reka sín egna handilsmi›depil í Saltangará.

# N‡ggjárskonsert vi› Frændum

**N‡ggjárskonsertin kemur afturíaftur í ár, eftir at hon ikki hevur veri› seinastu tvey árini**

KONSERT
*Ey›un Klakstein*

Nú skal lív koma í aftur n‡ggjárskonsertina.

N‡ggjárskonsertin hevur ikki veri› hildin seinastu tvey árini, men fríggjakvøldi› 29. desember kemur konsertin afturíaftur.

Ta› ver›a Frændur, sum fara at spæla á ársins n‡ggjárskonsert, og teir vera einasti bólkurin á konsertini.

Vanligt hevur veri›, at fleiri bólkar hava spælt á n‡ggjárskonsertini, men í ár hava fyrireikararnir, sum er Kyndil, valt at brúka helst kendasta føroyska tónleikabólkin.

Seinast Frændur var á palli var á Ólavsøkukonsertini í ár, tá teir vóru stórliga fagna›ir av stórari áhoyrarafjøld.

### Styrkja vaktarhaldi›

Ítróttarhøllin á Hálsi hevur seinastu árini nokta fyri at h‡st stórum konsertum, sum fara fram á náttartí›, tí konsertirnar fara so illa vi› høllini.

Ta› hevur veri› vanligt, at herverk hevur veri› gjørt á høllina, bæ›i inni og uttan fyri, og til dømis hava toilettini ikki fingi› fri›.

Nú Kyndil sleppur í høllina at hava konsert ver›a har›a treytir settar fyriskiparunum, sum eisini ætla at styrkja munandi um vaktarhaldi› í og kring høllina.

Vaktarfólk fara alla tí›ina at vera á toilettunum, so eingin ger seg inn á tey.

### Ov líti› fólk

Fleiri enn 1000 fólk plagdu at vera til n‡ggjárskonsertirnar, tá tær vóru í høllini á Hálsi, men tá konsertin sí›ani fluttu í Badmintonhøllina, var ikki rúm fyri fleiri enn 700 fólkum.

Hetta gjørdi, at fyrireikararnir valdu at gevast vi› konsertini, tí hon gav einki.

Bæ›i í fjør og fyrraári› var sostatt eingin n‡ggjárskonsert, men nú høllini á Hálsi aftur vil taka ímóti konsertini, hava fyrireikararnir avgjørt at leggja til brots aftur.



*Frændur fara at spæla á n‡ggjárskonsertini í ár, og teir vera einasti bólkurin á konsertini*



